# Skipan fyri Eysturoyar Dansifelag

§1
Navn felagsins er Eysturoyar Dansifelag.

§2
Endamál felagsins er at savna fólk saman til góðan føroyskan dans og stimbra áhugan fyri dansinum.

§3.
Tey, ið vilja verða limir, venda sær til nevndina, sum í hvørjum einstøkum føri avger limaskapin.

§4.
Dansitíðin byrjar í oktober og endar á fastilávint. Dansað verður eitt kvøld um vikuna.

§5.
Limagjaldið er 65 krónur um árið. Annars kann limagjaldið broytast á aðalfundi, um meirluti av teimum møttu limunum er fyri tí.

§6.
Limur kann verða koyrdur úr felagnum, um nevndin heldur orsøk vera til tess. Viðkomandi kann kæra til aðalfundin.

§7.
Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári í januar - februar mánað, og verður kunngjørdur limunum skrivliga ella í almennum lýsingarblað 14 dagar frammanundan.

§8.
Á ársaðalfundi verður vald ein 5-mannanevnd og roknskapargrannskoðari. Skiftivís ganga tveir og tríggir nevndarlimir út á hvørjum ári; hesir kunnu tó stillast upp aftur. Roknskapurin verður tá framlagdur fyri tað farna árið.
Uppskot frá nevnd ella limum er samtykt, tá meirluti av teimum møttu limunum á aðalfundinum er fyri tí. Nevndin skipar seg sjálv.

§9.
Roknskaparárið er álmanakkaárið.

§10.

Lógarbroyting kann verða gjørd á aðalfundi, tá ið minst helvtin av limunum er hjástødd, og 2/3 av teimum atkvøða fyri broytingaruppskotinum; er ikki helvtin av limunum møtt, verður lýst til eykaaðalfund, hvar vanligur meirluti er galdandi.

§11.

Felagið kann verða slitið, tá minst 2/3 av samlaða limatalinum atkvøða fyri hesum á aðalfundi.

§12.

Verður felagið slitið, verða ognir tess latnar til annað felag í oynni, sum stovnað er við sama endamáli. Um einki felag er ella verður stovnað innan 2 ár, verður síðsta nevnd at avgera, hvat gerast skal við ognir felagsins.